## DAGSINS MEINING

# Væl afturkomin

Hósdagin kundi okkara fremsti fótbóltsleikari við gleði staðfesta, at hann aftur stillar seg tøkan hjá føroyska landsliðnum. Ein støða, sum hevur verið øðrvísi seinastu trý árini, tá Todi við atliti til nógvu skaðarnar boðaði frá, at hann fyribils hevði tikið seg av landsliðnum.

Hetta var ein avgerð, sum frá fleiri síðum var alt annað enn væl móttikin. Orð sum neyvan hóska seg á prenti vóru at síggja í millum øðrum lesarabrøvum, og fyri fleiri hevði hetta helst eisini verið nóg mikið til, at hurðin varð læst fullkomuliga.

Men soleiðis skuldi tað tíbetur ikki enda. Hóast tað var sjónligt, at tað hevur staðið nógv á hjá Toda hesum viðvíkjandi, so hevur hann alla tíðina latið hurðina staðið á gloppi. Eisini hóast viðmerkingarnar, sum eru folnar, í mongum førum mugu hava sært ærukæra klaksvíkingin.

Hetta hevur hann tó alla tíðina hildið fyri seg sjálvan. Samstundis sum hann við avrikum sínum í FCK hevur verið eitt framúr umboð fyri Føroyar og føroyskan fótbólt.

Nú skal venjarin sjálvandi fyrst taka liðið út, men tað skuldi verið løgið, um Todi ikki verður millum teir fyrstu ellivu, sum tann 18. august fara á vøllin, tá landsliðið skal spæla móti Malta. Einki er at ivast í, at vónirnar tá verða stórar, men er tað nakar, sum er førur fyri at bera hesar vónir, so er tað Todi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Pant í fiskiloyvum

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*



Peningastovnarnir ynskja at fáa pant í fiskiloyvunum hjá skipum og bátum, og hava í síni jakstran eftir pantum lagt ynski fram og harvið biðja um hjálpt frá donskum og grønlendskum politikarum á Kristiansborg í seinastu viku.

Peningastovnarnir eiga at vita, at tað er her heima í Føroyum, at ásetingar og møguleikar í fiskiloyvunum vera ásettir. Fiskiskipini søkja um at fáa fiskiloyvi, fyri at kunna fiska og ikki fyri at kunna pantseta fiskiloyvið.

Fiskiloyvi verður givið, fyri at bátar og skip skulu hava møguleikar at troyta fiskigrunnarnar, sum eru ogn føroya fólks, og ikki fyri at peningastovnarnir skulu fáa pant í hesi somu ogn.

At geva peningastovnum pant í fiskiloyvunum, kemur at darva umsetiligheidini av fiskidøgum og skaða fleksibilitetin og dynamikkin í fiskidagaskipanini.

**Trygdin**
Skipini sjálvi, skulu ráða yvir fiskiloyvunum, ið tey hava fingið frá landsstýrinum, og ikki bankarnir. Besta trygdin hjá peningastovnum móti tapi, er at tað gongur væl hjá fiskiskipunum, og ikki eitt pant í fiskiloyvunum.

**Ólógligt**
Í dag hava skipini ikki loyvi at geva peningastovnunum pant í fiskiloyvum, og skal hetta kunna gerast, so krevst lógarbroyting. Her boðaði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í seinastu viku frá, at sitandi samgonga ikki ætlar at koma við nakrari lógarbroyting, ið gevur skipunum loyvi til at pantseta fiskiloyvini.

Eg loyvi mær at ivast í, um pant í fiskiloyvinum automatiskt vil viðføra lægri rentu ella at ungir menn í størri mun enn nú fara at fáa sær skip.

**Verandi fiskiloyvir**
Hyggja vit at skipunum undir fiskidagaskipanini, so ráða skipini/bátarnir fult út yvir sínum fiskidøgum, á landgrunninum, á Føroyabanka og yvir kvotuni í Íslandi. Hava tey brúkt 60% av døgunum ella kvotuni, eru tað skipini sjálvi sum avgera nær og til hvønn kvalifiseraðan keyppara teir selja, og tað skulu tey framhaldandi hava rætt til.

Hava skipini hinvegin latið bankunum pant í fiskiloyvinum, verður tað panteigarin sum hevur avgerðina, og tað gagnar hvørki skipanini ella samfelagnum.

# Munur á at lúgva og siga ósatt

**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*



Tað er fallið løgmanni fyri bróstið at vera kallaður lygnari. Hetta er sjálvsagt hørð og ófólkalig ákæra at reisa móti landsins hægsta manni, og var tað tí ikki uttan ótta, at eg nýtti hesa orðing. Men nú hevur løgmaður sjálvur greitt frá sínum grundgevingum fyri útsøgnunum um sparingarnar í miðfyrisitingini, og so er upp til ein og hvønn at meta um sannleiksvirðið í útsøgnum løgmans.

**At siga ósatt**
Øll kunnu koma soleiðis fyri, at tey onkuntíð siga ósatt. Tá hendir tað sum oftast, tí tey ikki hava fult innlit og ikki vistu, at tey søgdu ósatt. Men tá man veit, at man sigur ósatt, lýgur man. Okkurt er, sum bendir á, at løgmaður ikki segði allan sannleikan, og at hann visti hetta. Í bløðunum í dag viðgongur hann, at "tað var ein politisk samanbering, hann gjørdi". Hann viðgongur, at verður samtykta fíggjarlógin fyri 2004 samanborin við veruligu nýtsluna fyri 2003, er talan um eina 3% sparing. HVÍ HOYRDIST TANN BOÐSKAPURIN IKKI Á TÍÐINDAFUNDINUM?? Kanska tí, at so var hann ikki serliga áhugaverdur meir??

**Hvat er miðfyrisiting?**
Tá løgmaður brúkar orðið miðfyrisiting um samlaðu játtanina til aðalráðini, so skal hetta eisini takast við fyrivarni. Tí í játtanini til aðalráðini liggja fleiri játtanir, sum ikki kunnu kallast miðfyrisiting. Nøkur dømi eru játtan til tilbúgving, ráð og nevndir, EDV-verkætlanir, ymiskt viðlíkahald, granskingarætlanir, brunaumsjón o.a. Hesar nevndu útreiðslur fara ikki til at hjálpa landsstýrismanninum við politiska og fyrisitingarliga arbeiðnum, men til aðrar uppgávur, sum av praktiskum orsøkum liggja undir aðalráðunum.

**Ongi størv spard**
Løgmaður hevur almént váttað, at ongi fólk verða uppsøgd í miðfyrisitingini. Sostatt er ongin ítøkilig sparing gjørd í tí, sum telur nakað í miðfyrisiting. Og tí kann av røttum verða spurt, hvat er so sera áhugavert í boðskapi løgmans.

**Hví úrslit eftir 100 dagar?**
Hinvegin skilji eg heldur ikki, hví løgmaður er so altráður eftir at vísa á ítøkilig úrslit teir fyrstu 100 dagarnar. Øll vita, at góður politikkur tekur tíð og góðir politikkarar ikki lata seg trýsta til skjóttfingnar loysnir í politikki. Skjótar loysnir kosta sum oftast í seinna enda, tí tá hava tær í flestu førum ikki fingið ta neyðugu búningartíðina, sum politiskar loysnir í flestu førum krevja. Heldur ikki havi eg hildið, at nakar hevur kravt løgmann og samgonguna eftir ítøkiligum politiskum úrslitum hesar fyrstu 100 dagarnar.

**Samanumtikið**
Um løgmaður er lygnari ella ikki er sjálvandi upp til hansara egnu samvitsku at meta um. Men at samgongan megnar at spara 3% í almennari fyrisiting er hóast alt at fegnast um, og fari eg als ikki at taka hendan heiðurin frá løgmanni. Vónandi fer tað at eydnast at halda fast um, at almenn fyrisiting má tódna saman við búskapargongini sum heild. Eg fari at enda at ynskja løgmanni hepna hond at møta teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Bakbit

**Eilif Samuelsen**



Norðuratlantsbólkurin hevur í síðstu viku havt eitt av sínum tiltøkum til frama fyri samskipaðu strembanina at loysa Grønland og Føroyar frá Danmark. Tað er í lagi, at Tjóðveldisflokkurin virkar fyri tí einasta politiska málinum, hann í roynd og veru hevur. Fyri seks árum síðani kom Høgni Hoydal inn á ting fyri Tjóðveldisflokkin. Hann hevði við sær heimanífrá eitt spildurnýtt projekt, sum hann tók allan flokkin á bóli við. Hetta fullveldisprojektið stýrdi fullkomiliga politikkinum í samgongunum frá 1998-04, enntá so nógv, at nú aftaná er ilt at vísa á nakað týðandi politiskt avrik til frama fyri føroyska vinnulívið, mentanarlívið ella samfelagslívið sum heild.

Nú er flokkurin rikin frá valdinum, fullveldið skinndeytt og abstinensirnir gera um seg. Tí má flokkurin markera seg í andstøðu við at taka upp stórmál, so sum at taka løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum í at pella ella at gera ov nógv av og krevja av teimum, at teir alment skulu lova ikki at gera grin burtur úr tørvandi avrikunum hjá fullveldislandsstýrunum.

**Fullveldið gongur aftur**
Tað er staðfest ferð eftir ferð, at meiriluti er ikki í føroyska fólkinum fyri at loysa frá Danmark. Tí undrar tað ikki so lítið, at fullveldisfólk hava so lítla virðing fyri føroyska fólkaviljanum. Tey, sum eru sannførd um, at tað er rættast fyri føroyska fólkið at varðveita ríkisfelagsskapin, eru av tjóðveldisleiðsluni vorðin skírd at vera minni verdir føroyingar og tað, sum verri er. Men hesin størri parturin av fólkinum hevur treytaleyst krav uppá at vera tikin fyri fult fyri sínar meiningar. Ein av hesum meiningum er, at tey taka undir við, at Føroyar fáa eina ríkisveiting.

Tað má tí roknast fyri undangravandi virksemi, sum Tjóðveldið hevst at, nú fólk, sum notoriskt eru ímóti blokkstuðli, verða send til at indoktrinera danskar politikarar og danska almenningin og fóðra tey við ivasomum og deils misvísandi upplýsingum um, hvussu skaðiligur og niðurbrótandi danski ríkisstuðulin er fyri føroyska samfelagið. Flestu føroyingar taka ikki undir við hasum sjónarmiðinum, tí teir vita, at tað er ikki rætt.

Tað var jú ikki ríkisstuðulin, sum koyrdi landið út í óføri seinast í 80unum og fyrst í 90unum, men heldur tann óhóvsama, óforsvarliga lángevingin frá peningastovnunum og eitt landsstýri, sum m.a. visti alt ov lítið um veruligu fíggjarviðurskiftini og tí eisini sveik.

Um nakað hald er í postulatinum um, at ríkisveitingin upphitar og oyðileggur føroyska búskapin, hví kempa so øll, eisini Tjóðveldisflokkurin, fyri, at vit einaferð skulu fáa stórar inntøkur frá oljuvinnuni, tá ið hesir pengar fara at fáa effinett somu ávirkan á føroyska búskapin, sum ríkisveitingin hevur?

**Fíggindamyndir**
Tá ið fullveldisætlanin í 1998 kom fram, varð ein víðfevnd strategi løgd út í æsir, hvussu loysingin skuldi fremjast. Javnber m.a. heimasíðuna hjá tí landsstýrinum og tey væl trimmaðu slagorðini, sum skuldu endurtakast í tað óendaliga, so at tey sótu í hámønuni á hvørjum einasta føroyingi, arbeiðið við Hvítubók, sum legði hald á arbeiðsmegina hjá meginpartinum av føroyska embætisverkinum í áravís, Yvirtøkulóg, samtykt um sjálvstýri Føroya fólks o.s.fr.

Ein av høvuðsstrategiunum hjá fullveldisoddaliðinum var at skapa nakrar markantar fíggindamyndir. Ein fíggindi er eitt væl definerað mál. Fíggindar hevur ein andstygd fyri, og teimum skulu øll berjast ímóti. Tvey av hesum málunum, sum skuldu leggjast fyri hatur vóru Danmørk og danir og so blokkstuðulin.

Henda ráðstevnan, sum Norðuratlantsbólkurin skipaði fyri seinasta týsdag á Christiansborg hevði í veruleikanum eittans endamál, hóast hon var slørað og pakkað inn í búskap, og tað var at sáa misálit á ríkisveitingina og bera so nógv ilt fyri henni, at danir skuldu halda, at hetta var almenna hugsanin í Føroyum, og at danir sjálvir skuldu fáast at taka stig til at skerja og kanska heilt avtaka blokkin.

**Nú mugu danir hjálpa**
Tað hevur ikki eydnast Høgna Hoydal og fylgisneytum hansara at sannføra føroyingar í Føroyum um, at ríkisstuðulin er av tí ónda. Ei heldur er tað eydnst teimum at sannføra føroyingar um, at allir danir eru reinir devlar, sum eru rótin til alt ilt, sum hendir í Føroyum. Tí verður nú farið aftur um ryggin á føroyingum og niður til Danmarkar at leita sær hjálp at ganga uttan um meirilutan í Føroya fólki og uttan um landsins fremstu stovnar: løgtingið og landsstýrið. Teir føroysku fyrilestrarhaldararnir úr fíggjarheiminum vóru qua síni størv væl valdir til endamálið, og íslendingar eru altíð góðir í ávikum.

Fyrstu úrslitini vísa, at tiltakið hevur borið frukt. Danskir politikarar hava longu úttalað, at nú má umhugsast at skerja blokkstuðulin. Sig so at uttanumparlamentarisma ikki kann føra á mál, tá ið ein ikki fær parlamentarismuna at makka ræt. Tað er ein ivingarsom søk, at fullveldisfólkini nú eru farin at brúka loysunarorðið, sum verður heft at jesuittunum, at endamálið halgar gerðina. Hetta er ið hvussu er enn ein váttan um okkurt ófrættakent?

# Álvarsligt mistak í »Degi og Viku«

**Rolf Guttesen**



Sjónvarpið segði 1. juni í "Degi og viku" frá, at Landsstýrið hevði fingið vitjan av umboðum úr Hetlandi, Orknoyum og Hebridunum. Hoyrdi eg rætt, so var sagt at »teir fýra landsráðsformenninir úr hesum bretsku hjálondunum hava havt fund við Løgmann«.

Hesar oyggjar eru ikki bretsk hjálond.

Hvat ið tíðindamaðurin hevur hugsað, tá stubbin bleiv skrivaður, veit eg ikki. Kanska tað, at hesir oyggjabólkar fyri sunnan ikki hava sama sjálvstýri sum Føroyar, og ikki eins og Føroyar hava ein vissan rætt til at gera millumlanda avtalur. Hetta vísir bara, hvussu góðar møguleikar og víttgangandi rættindir Føroyar hava í Ríkisfelagsskapinum, sum onnur kanska misunna okkum.

Kanska vísir tað eisini, at føroyska orðið »hjáland« er misvísandi, tí tað kann og verður brúkt um líkt og ólíkt. Koloniir, protektoratir, skattlond, 'bilond' ella hjálond. Sakin er, at orðið hjáland er ein umseting av tí danska ella norska 'biland'. Einaferð vóru Føroyar og Ísland roknað sum 'bilande', meðan Grønland og Vestindisku oyggjar-nar vóru koloniir.

Hetland, Orknoyar og Hebridurnar eru partar (districts) av Skotlandi, sum gjøgnum kongafelagsskap síðan 1707 er sameint við England. Tí nevnist landið: »United Kingdom of Great Britain and Northern Ireland«. Great Britain ella Stóra Bretland er navn á oynni, sum umfatar Skotland, England og Wales.

Eftir sum »Bretland« eisini umfatar Skotland, og nevndu oyggjar og fleiri aðrar eru partar av Skotlandi, ber ikki til at nevna tær koloniir ella hjálond. Ja, um ikki eitt privat-politiskt ynski verður lagt í orðingina. Men tað kann ikki verða uppgávan hjá einum frásøgumanni í sjónvarpinum.

# Var Jóannes Eidesgaard »loyalur« móti fullveldissamgonguni???

**Áki Andreasen**



Oddagreinirnar í Sosialinum hava mangan verið merktar av øvund, veruleikafjarar og til tíðir meira skemtiligar enn gott er fyri eina oddagrein.

Tað var tann tíðin tá oddagreinskrivarar Sosialsins ikki fingu umrøtt nakað samfelagsmál uttan at Tjóðveldisflokkurn bleiv settur í samband við alla ólukku, oddagreinirnar høvdu úr at gera at deila Tjóðveldisflokkin í ymiskar bólkar og innanhýsis viðurskiftini vóru í Tjóðveldisflokkinum.

Og nú eru eina oddagreinin fyri og onnur eftir reinar politiskar undanførslur fyri sitandi samgongu.

**Loyal fólkatingsumboð??**
Tað er fallið Sosialinum fyri bróstið, at Norðuratlantsbólkurin skipaði fyri einari ráðstevnu um blokkin á Christiansborg. Oddagreinin í Sosialinum mikudagin 02. juni - ger nógv burtur úr »óskrivaðum lógum« fyri umboð Føroya á Fólkatingi. At umboðini til einhvørja tíð hava verið og eiga at vera »loyal« mótvegis einhvørjari samgongu í Føroyum.

Álvaratos - heldur oddagreinskrivarin at minnið hjá føroyinginum er so stutt, at hann ikki minnist, hvussu núverandi løgmaður nýtti eitthvørt høvi at undirgrava fullveldisætlanina hjá tá sitandi samgonguni?? Hvussu Jóannes Eidesgaard var umboð hjá Poul Nyrup Rasmussen og donsku stjórnini - og beinleiðis mótarbeiddi politiska viljanum hjá samgonguni, hvussu Jóannes Eidesgaard á Fólkatingi gjørdi alt hann var mentur fyri at mótarbeiða og boða dønum frá, hvussu tá sitandi samgonga var við at koyra alt samfelagið í sor?? - hvar var loyaliteturin og tær óskrivaðu lógirnar tá??

Ella umboð Sambandsfloksins - hvar var loyaliteturin hjá Listbeth Petersen mótvegis samgonguni sum sat???

Nei - tað er syndarligt at síggja hvussu tunt soðið er vorðið í oddagreinunum á Sosialinum, og hvussu sjónligt tað er, at Javnaðarfólk hava fingið ilt av, at ráðstevnan um blokkin hevur fingið innivist í Sosialinum.

**Kjakið um blokkin**
Bæði Bárður Nielsen og aðrar sambandskreftir vaknaðu við kaldan dreym, tá danskir politikarar og onnur settu spurnaðartekin við blokkin - »vit hava brúk fyri hvørjum oyra« staðfesti fíggjarmálaráðharrin, tað sama slegði løgmaður fast - ei dáni í; tí blokkurin er teirra politiska livibreyð. Hvat skuldu sambandsmenn í samgongufIokkunum gjørt um blokkurin bleiv burtur - og enntá eftir kravið frá donskum myndugleikum?? Teir hótta við vælferðini - tað er eitt gamalt vápn sum er takksamt at brúka - men ynskiligt hevði verið at farið var longri enn bert at leggja somu gomlu - og eftirhondini skøvaðu plátuna á um skerda og minkandi vælferð, fáa vit ikki danskar pengar.

Hesir somu hava ikki verið smædnir og kalla tankan um, at blokkurin hvørvur eftir ynski frá dønum fyri »fjant og fjas« - eingin av flokkunum sum sita í samgongu í dag hava havt ein vilja at fingið eitt kjak um blokkin - hóast Tjóðveldisflokkurin ferð eftir ferð hevur roynt at fingið evnið á dagsskránna.

Men sum so mangan, so skulu danskir politikarar til fyri at afturhaldsflokkarnir ressast á og vilja kjakast um eitt so týdningarmikið mál sum blokkin. So nú røkist kanska fyri at eitt veruligt og gagnligt kjak um blokkin verður sett á dagsskránna.

**Synd í samgonguni....??**
Norðuratlantsbólkurin skal hava rós fyri at fáa slíka ráðstevnu í lag. At Sosialurin tosar um óskrivaðar lógir og loyalitet kann Norðuratlantsbólkurin ikki taka sær av - flestu lesarar hjá blaðnum hava helst hvept seg við tá umtalaða oddagreinin er lisin.

Hvat er galið við at skipa fyri einari ráðstenvu um blokkin á Christiansborg, skilji eg púrt einki av, og vit kunna ikki halda áfram at taka synd í samgonguni - nú má politiski gerandisdagurin vera á skránni og mál sum viðkoma tí føroyska samfelagnum.